# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Linhild Jóhannesen

**f. 20.12 1959 - d. 06.04.2006**



"Mær er sagt um ein stað í tí høga" soleiðis byrjaði fyrsti sálmurin í Glyvra kirkju týsdagin 11. apríl – henda dagin, vit skuldu siga farvæl við Linhild, okkara starvsfelaga. Sjálvt um dagurin var so dapur fyri okkum øll, so var hann eisini ein stak vakur dagur við stilli og sólarglottum, júst soleiðis sum vit kendu okkara Linhild.

Linhild, hin stilla og góða, við sínum serstaka smílandi lyndi, sum altíð fekk okkum at minnast tað góða, sum býr í hvørjum menniskja.

Linhild var dagrøktari í 14 ár, og røkti hetta arbeiði sera væl. Hon var góð við børnini og tey við hana. Somuleiðis var hon nógv avhildin millum starvsfelagarnar við sínum blíða og hjálpsama lyndi. Linhild var saman við okkum til jólaborðhaldið fyri jól 2005. Tá tyktist alt at ganga rætta vegin, og vón var fyri at sjúkan var bast og lívið kundi ganga víðari.

"Harrans vegir eru ikki okkara vegir" m.a. soleiðis tók Meinhard Bjartalíð, prestur til í síni sera góðu og kenslubornu talu við jarðarferðina.

Hesi orð fingu vit so eisini at sanna, nú Linhild ikki longur er millum okkum.

Tað er ikki av tilvild, at sálmurin "Mær er sagt um ein stað í tí høga" var sungin í kirkjuni við jarðarferðina. Hvørt eitt orð í sálminum er grundað á tað trúgv, sum hevði so sterkar røtur í Linhild og sum hon bygdi sítt lív á saman við síni kæru familiu.

Vit í dagrøktini vilja við hesum minnast ein góðan og hjálpsaman starvsfelaga, ein høgt virdan og góðan dagrøktara og sum hevði stóra umsorgan fyri okkum øll.

Tankar okkara leita til tín Hera og børnini Louis, Siri og Jannu, sum hava mist so ómetaliga nógv, men eisini hevur eftirlatið so nógv góð minnir og sum tit skulu byggja lív tykkara víðari á.

*Linhild er tí landi ei tár skulu renna,*
*eingin pína og sjúka skal níva,*
*har ei særandi sorg er at kenna,*
*- um eitt bil, ja, so eri eg har.*
*Ei skal gleðinnar dagur har halla,*
*ei skal ivin tá tyngja mítt sinni,*
*aldri meira vit snáva og falla,*
*tí tá eru vit heima, o, Gud!*

Takk fyri at vit eisini fingu lut í tí stóru og gevandi gávu, sum tú, Linhild, var fyri okkum allar.

Takk fyri alt, vit síggjast!

**Dagrøktararnir í Runavík**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Linda Gardar** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Kristianskirkjuna hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13.30. Tey, ið vilja minnast Linda kunnu lata Emmaus eina gávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

**Jonhard Vang Jacobsen úr Syðrugøtu** fer til gravar úr Gøtu kirkju hósdagin kl.14. Tey, ið vilja minnast Jonhard, kunnu lata Gøtu kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Ebba Lamhauge**, búsitandi í **Florida**, andaðist sunnudagin 11. juni, 84 ára gomul.

**Louis Sigfred Andreasen, Eiði**, fer til gravar úr Eiðis kirkju fríggjdagin kl. 14

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Marjun W. Niclasen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Jónsvein Bech fyri troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, organist, berarar og gravara.
Tøkk til Landssjúkrahúsið, Suðuroyar Sjúkrahús og Suðuroyar Ellis- og Røktarheim.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur til Hjartafelagið og til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Hans Rudolf, Leif Erik, Finnbjørn og Kári**

Oda Guld Bruun, listakvinna:

## Framsýningin við geometriskum myndum



*Oda Guld Bruun letur upp eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin 16. juni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 16. juni letur eina framsýning hjá Odu Guld Bruun upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin er sett saman av myndum við einfaldum geometriskum myndum, ið eru málaðir á lørift ella træplátur.

Oda Oda Guld Bruun, sum býr í Keypmannahavn, var fyrstu ferð í Føroyum í 2004, og er hon sera hugtikin av ljósinum og litunum í okkara náttúru.

Hon hevur fingist við málningalist í umleið 20 ár. Tey seinastu trý árini hevur hon málað á Billedskolen í Keypmannahavn, ið er ein nógv virdur listaskúli. Í løtuni arbeiðir hon í einum atelieri saman við øðrum málarum.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 20. juni, allar dagar frá kl. 15.-20.

**80 ár**
Paula Davidsen, Sørvágur verður 80 ár fríggjadagin 16. juni. Føðingardagurin verður hildin í heiminum hjá dóttrini Hallu Henriksen.

**Dagurin í morgin**

**16. juni. Tycho.** Í fjórðu ella fimtu øld var hann biskupur í Amatus á Kypros.

# Lesið Sosialin - so eru tit við